SKODA OCTAVIA 1,6

Skrásetingarnr: FJ 392 **Km:** 78.000
Árgangur: 01.12.00 **Seinast sýnaður:** 20.08.04

Kr. 82.000,-

TOYOTA COROLLA 1,3 111-SERIA

Skrásetingarnr: TN 455 **Km:** 95.000
Árgangur: 12.05.99 **Seinast sýnaður:** 18.09.06

Kr. 65.000,-

TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL BUS. SED. 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: FG 042 **Km:** 64.000
Árgangur: 27.04.04 **Seinast sýnaður:** 27.04.04

Kr. 225.000,-

TOYOTA AVENSIS 2,0 TD 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: SU 198 **Km:** 160.000
Árgangur: 26.08.98

Kr. 85.000,-

KIA CARENS 2,0 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: TE 148 **Km:** 47.000
Árgangur: 09.09.03 **Seinast sýnaður:** 09.09.03

Kr. 128.000,-

TOYOTA CAMRY 3,0 GL SEDAN AUT. 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: ER 235 **Km:** 94.000
Árgangur: 12.04.00 **Seinast sýnaður:** 09.11.05

Kr. 165.000,-

CITROEN XSARA 1,6 STW 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: AK 361 **Km:** 32.000
Árgangur: 01.01.02 **Seinast sýnaður:** 01.03.06

Kr. 108.000,-

MITSUBISHI CARISMA 1,8

Skrásetingarnr: BV 662 **Km:** 172.000
Árgangur: 08.08.96

Kr. 42.000,-

KIA CARNIVAL 2,9 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: VS 473 **Km:** 102.000
Árgangur: 06.09.01

Kr. 125.000,-

OPEL VECTRA 1,6 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: FM 129 **Km:** 72.000
Árgangur: 10.04.02 **Seinast sýnaður:** 29.05.06

Kr. 95.000,-

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.

Hava lært til make-up artistar

Rannvá, Sólgerð, Randi, Elisabeth, Guðrið, Ásla, Harda, Elisabeth og Laila

Átta næmingar á make-up skeiði hjá Lailu Hansen fingu diplom sum make-up artistar fríggjakvøldið

MÓTI
Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

Tær átta kvinnurnar, sum fingu handað diplom í professionellari make-up, hava tikið útbúgvingina sum kvøldskúla seinastu tríggjar mánaðirnar, har tær hava gingið í skúla í trý til fýra kvøld um vikuna.

Tað er Laila Hansen, kosmetologur, ið er gift við Hans Fróða Hansen, stylinsti, sum hevur skipað fyri skeiðinum, ið er fyrsta av slíkum slagi í Føroyum. Í sambandi við, at kvinnurnar nú kunnu rópa seg make-up artistar fáa tær hvør sítt kuffert við øllum greiðum í, sum ein professionellur make-up artistur hevur brúk fyri.

– Útbúgvingin hevur kostað teimum 25.000 krónur og nú kunnu tær bjóða seg fram til at smyrja fólki til eitt og hvørt høvi. Til dømis til brúdleyp, kvøld og dag, film, myndatøkur, sjónleik, fantasy og annars alla staðni, har tað er eitt krav, at smyrslið er perfekt og heldur sær, sigur Laila Hansen, sum hevur staðið fyri undirvísingini saman við Elisabeth Johannesen. Og Laila leggur afturaf, at hon helst fer at bjóða eitt tílíkt skeið úr aftur einaferð fyrst í komandi ári.

– Vit eru ómetaliga væl nøgdar við úrslitið og gleða okkum til at bjóða okkum fram ymsa staðni, siga glaðu næmingarnir, sum nú fara í býin at hátíðarhalda nýggja tittulin.

Tær seta eftirgjørdar eygnavippur á

Jólahugni í Havn

Sera hugnaligt var í miðbýnum leygardagin, tá Jólaskipið legði at í Vágsbotni. Aftaná bar til hjá mongu fólkunum at stíga inn á í Miðlahúsinum til drekkamunn og klarinettónleik ella niðan í Jólabýin, har mongu búðirnar lýstu upp í myrkrinum. Seinni var móttøka fyri Vígdis og Sáru í ráðhúsinum.

rd.